## Koyrdi útav við kenning

Leygarnáttina varð løgreglan boðsend til eitt ferðsluóhapp á vegnum beint norðan fyri Kollafjarðartunnilin. Ein maður hevði koyrt útav og hevði gjørt skaða á eitt stik. Men tað, sum verri var, er tað, at tá ið løgreglan kom á staðið, vísti tað seg, at hann hevði kenning, so seinasta orðið er ikki sagt í hesum máli enn. Sjálvur slapp hann frá óhappinum við smærri snuddum. Annars hevur telefonin hjá løgregluni kimað dúgliga í nátt, men talan hevur bara verið um smáttarí. Onkur fór til hendurs í miðbýnum, men tað spældi væl av. Løgreglan mátti eisini rudda ymisk skelti burtur, sum onkur hevði tveitt út á vegin og fráboðanir vóru eisini um avdottin fólk, húsaófrið og annað tílíkt



## Nýtt felag fyri løgfrøðingar

Tann 22. mai varð stovnandi aðalfundur í felagnum Lóg. Felagið er stovnað við tí endamáli at skapa eitt forum fyri fakligum kjaki, samstarvi og íblástri um løgfrøðilig evni. Millum teir 25 løgfrøðingarnar, ið vóru á fundi, varð ein fimm manna nevnd vald. Í nevndina komu Jóannes Madsen, Gunn Ellefsen, Finn Ougaard, Kristina Samuelsen og Katrina Maria Johannesen. Nevndin skipaði seg aftaná við Kristinu Samuelsen sum formanni og Finn Ougaard sum næstformanni. Áhugaðir løgfrøðingar, ið ikki hava fingið kunning um felagið, eru vælkomnir at venda sær til ein av nevndarlimunum, sigur nýggja felagið í tíðindaskrivi.

# Óheppið fyri rættartrygdina í Føroyum

**Lógmálaráðið í Tinganesi er so illa mannað, at tey fáa ikki havt nóg gott eftirlit við lógaruppskotum, sum skulu leggjast fyri Løgtingið. Tað er ómetaliga óheppið fyri rættartrygdina, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna**

RÆTTARTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, sigur, at hon fær ikki røkt sínar skyldur í Landsstýrinum og tað er óheppið fyri rættartrygdina í Føroyum*

Lógmálaráðið í Tinganesi er ógvuliga illa mannað.

Ein uppgáva hjá lógmálaráðnum er at gjøgnumganga øll lógaruppskot, sum landsstýrisfólk ætla at leggja fyri Løgtingið fyri at tryggjað, at tey eru ílagi og at tey eru rætt orðað og ikki í mótstríð við aðrar lógir.

- Men vit eru so illa mannað, at tað er ein uppgáva, vit als ikki fáa røkt á nøktandi hátt, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógarmálum.

Hon sigur, at lógardeildin lógmálaráðnum hevur bara tveir løgfrøðingar í starvi, har tann eini eisini er deildarstjóri og tað er als ikki nóg mikið til at gjøgnumganga øll lógaruppskotini.

- Sostatt er tað rættiliga vónleyst hjá okkum at røkja okkara eftirlitsskyldu við lógaruppskotum, sum skulu leggjast fyri Løgtingið.

- Tì er tað ógvuliga átrokandi at fáa pening til fleiri løgfrøðingar, so at vit fáa røkt hendan partin av okkara virkisøki nóg væl.

- Serliga nú vit hava so nógvar yvirtøku á skránni eins og nógv ríkislógartilmæli skulu lagast til og setast í gildi í Føroyum, er tað ógvuliga átrokandi, at vit uppraðfest sjálva lógardeildina, so at vit fáa gjøgnumgingið alt tað lógararbeiði á nøktandi hátt.

Hon heldur tí, at tað er neyðugt at fáa einar tveir løgfrøðingar afturat, men tað hevur løgtingið ikki játtað pening til, sum støðan er nú.

Hon heldur, at í einum rættarsamfelag er tað rættiliga óheppið, at tey ikki hava nóg mikið av arbeiðsorku til at eftirkanna tær lógir, sum skulu setast í gildi í Føroyum.

- Sum støðan er nú, hava vit verið noydd at send fleiri stór lógarverk aftur til tey ráðini, sum skulu leggja tey fyri Løgtingið, uttan at hava havt møguleikan at eftirkanna tey nóg væl.

Hon nevnir nýggju tryggingarlógina og lógina um Fróðskaparsetrið sum dømi um tvær slík lógaruppskot, sum tey ikki hava havt umstøður at eftirkanna nóg væl, men fleiri onnur dømi eru.

- Men tá ið trupulleikar stinga seg upp, er tað ofta fyrisitingin, sum stendur fyri skotum. Tí er trupulleikin ikki bara tann, at okkum tørvar fólk, Trupulleikin er eisini, at tað er tórført at varðveita fólkið, vit hava sum er nú, tí tað er ikki serliga motiverandi at standa fyri skotum í heilum, tá í veruligi trupulleikin er, at tað er trot á fólki.

# Royna at lata eyguni á fólki upp fyri almenna sambandinum

**Leygardagin verður ókeypis at koyra við bussunum Bygdaleiðum og at sigla við skipunum hjá Strandferðsluni. Men fyri at lokka fólk at brúka almennu bussarnar, verður tað ikki ókeypis at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í egnum bili**

ÓKEYPIS FERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin 31. mars ætla landsstýrið og Strandferðslan at gera eina roynd at lata eyguni á fólki upp fyri almenna ferðasambandinum við bussunum hjá Bygdaleiðum.

Tá verður nevniliga ókeypis at sigla við Strandferðsluni og at koyra við bussunum hjá Bygdaleiðum.

Men tað verður ikki ókeypis at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í egnum bili.

Og tað er við vilja at tað er gjørt so, at tað eisini henda dagin skal kosta at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar í egnum bili.

- Ætlanin er gera eina roynd at lata eyguni á fólki upp fyri møguleikanum at, sum almenna bussambandið hjá bygdaleiðum gevur fyri at ferðast ímillum bygdir og oyggjar, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógarmálum.

Hon heldur, at fólk eru kanska ikki nóg varug við hendan møguleikan, sum tað er at ferðast við bussunum hjá Bygdaleiðum.

Serliga nú prísurin og olju og bensini bara ganga uppeftir, kann tað í allar mátar verða skilagott at venja seg til at brúka bussarnar heldur enn altíð at koyra í egnum bili.

### Tey fægstu brúktu bussarnar

Strandferðslan fær pening á fíggjarlógini til at gera tað ókeypis at ferðast við Strandferðsluni og Bygdaleiðum í tveir dagar um árið.

Í fjør var tað ókeypis at sigla við Strandferðsluni sama dag sum undirsjóvartunlarnir vóru ókeypis.

Royndirnar vísa, at nógv størsti ferðafólkastreymurin var frá útjaðaranum inn á meginøkið við egnum bili og at møguleikin at ferðast ókeypis við bussunum varð lítið brúktur.

Fyri at fáa fleiri fólk at koyra við Bygdaleiðum, serliga ígjøgnum undirsjóvartunlarnar og eisini fyri at fáa fleiri fólk at ferðast frá meginøkinum til útjaðaran, verður tann fyrri ókeypis ferðingardagurin í ár lagdur leygardagin, har tað ikki er ókeypis at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar.



*Tá ið tað í fjør var ókeypis at koyra við Bygdaleiðum og at sigla við Strandferðsluni, gekk nógv størsti streymurin av ferðafólki úr útjaðaranum inn í meginøkið við egnum bili. Møguleikin at brúka bussarnar var lítið brúktur, men nú verður ein roynd gjørd at gera fólk varug við tann møguleikan, sum Bygdaleiðis geva og vónirnar eru eisini til, at fleiri fara at ferðast úr miðstaðarøkinum út í útjaðaran*